## DAGSINS MEINING

# Meiningsfrælsi?

Nógvar viðmerkingar hava verið til, at Sosialurin var seldur herfyri. Eisini hava nógv tíðindi sirkulerað um søluna, ið ikki hava verið eftirfarandi, men hava verið trúligani uppafturtikin av fólki, ið annars plaga at fyrihalda seg sera kritiskt til keldutilfar. Um tað skyldast samanfall við, hvat viðkomandi ynskja at halda, skal her verða ósagt.

Sjúrður Skaale hevur eina viðmerking til keypið í bløðunum í hesum døgum. Nú er Sjúrður Skaale ikki hvør sum helst, og man teljast millum tey rættiliga royndu fjølmiðlafólk í Føroyum, og tí eigur ein viðmerking frá honum at verða víst ans.

Fyriuttan, at Sjúrður Skaale endurgevur onkran skeivleika viðvíkjandi, nær leiðsla og starvsfólk á Sosialinum saman við Føroya Tele lótu boð inn, og at hann einki pláss letur vera fyri iva viðvíkjandi viðtøkunum hjá Føroya Tele, so er kjarnin í tí hann sigur sera áhugaverd.

Størsta argumentið hja Sjúrða Skaale ímóti involvering frá Føroya Tele er, at blaðstjórarnir eru “partísoldatar” og javnaðarmenn. Fyriuttan at Skaale neyvan man hava eftirkannað nakran limaskap, og kanska soleiðis fingið sær eitt yvirraskilsi, so man tað verða fyrstu ferð, at ein minoritetsíløga í eitt privat virki verður mett eftir hvønn politiskan lit, uttanfyristandandi meta leiðsluna hava. Hetta er ikki sørt óhugnaligt.

Allar avísir hava meiningar í sínum oddagreinum. Vit kunnu taka fjølmiðlaimperiið hjá Rupert Murdoch, sum er primert konservativt, uttan tó at verða meira ella minni kommersielt áhugavert fyri tað. Danska Jyllandsposten hevur borgarlig sjónarmið í sínum oddagreinum, Politiken liggur á radikala bógvin o.s.fr. Einki av hesum bløðunum er verri investeringsobjekt av tí grund. Hví skuldi ein føroysk avís verið øðrvísi? Tíðindaflutningurin er óheftur, men sjónarmiðini í oddagreinum eru tey, ið ábyrgdarblaðstjórin leggur fyri dagin, uttan at spyrja partaeigarar ella nakran annan eftir.

Skulu almennar fyritøkur bert kunna eiga partabrøv í privatum fyritøkum, har leiðslan ikki gongur á val? Skulu vit hava statsgóðkendar meiningar, ið skulu liggja til grund fyri, hvørt ein almenn fyitøka skal kunna gera íløgu í hetta privata virki ella ikki?

Tað tykist eisini sum fólk gloyma, at hetta er eitt privat virki, ið verður selt og ikki ein almenn fyritøka. Somuleiðis verður gloymt, at Føroya Tele bert er minoritetsaktionerur í einari fyritøku, ið hevur ment seg heilt nógv farnu árini.

Tað er væl skilligt, at ein fyrrverandi skribentur á einum nú niðurfyridottnum blað, har man megnaði at fáa politikk inn í sjalvt ítróttartíðindini, hevur illgruna til bæði eitt og annað, men vit kunnu vissa Sjúrður Skaale um, at Sosialurin framhaldandi fer at menna seg til eitt uppaftur betri og størri miðlahús við útbygdum tænastum við endamálinum at geva avkast til partaeigarnar, sum ikki høvdu gjørt íløguna, um teir ikki trúðu uppá avkast.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað er so lætt tá onnur gjalda rokningina, Sjúrður Skaale!

EIRIKUR LINDENSKOV
Blaðstjóri



**Við søluni av blaðvirkseminum hjá Sosialinum fekk Javnaðarflokkurin fleiri hundratúsund krónur færri – tí partafeløgini hjá flokkinum hava goldið prentrokningar fyri tjóðveldisfólk, sum ikki megna at geva út bløð. Seinasta eksperimentið var Fregnir**

Hvørjaferð Sjúrður Skaale umrøður Sosialin, Jan Müller og meg sjálvan, so fær tað meg at hugsa:

– Hvat bagir honum nú?

– Er hann øvundsjúkur ella er hann óreinur?

Eg kenni Sjúrð. Býttur er hann ikki. Hann er gløggur, og hann er sera skemtiligur, tá tað lagið er á honum. Men hansara ævigu sannleikar um, hvussu øll onnur eiga at vera og eiga at uppføra seg, teimum eri eg – og helst mong onnur við mær, farin at troyttast av.

Og fyri tað, um fólk ikki eru samd við honum um politiskar spurningar, so er ikki vist, at øll onnur eru býtt fyri tað.

Men tá Sjúrður Skaale skal fortelja okkum, hvussu vit skulu gera bløð, tá haldi eg, at hann tilleggur sær størri dugnaskap, enn hann hevur. Soleiðis kundu vit fyri tað sagt um so nógvar aðrar tjóðveldismenn, sum gjøgnum árini hava roynt at fingið bløð út, t. d. 14. September.

Javnaðarflokkinum verður kastað alt møguligt fyri, tí at flokkurin nú hevur »privatiserað« Sosialin. Hetta hevur flokkurin kunnað, tí at blaðið hevur verið væl rikið og hevur ment seg so nógv gjøgnum árini, at flokkurin nú er vorðin fleirmillióningur.

Men um tað ikki var fyri hesar breiðkjaftaðu tjóðveldismenninar o. a., so hevði bankabókin hjá Javnaðarflokkinum verið nógv tjúkkri – tí so hevði flokkurin kunnað innkasserað útvið eina millión afturat.

Dømini um hetta eru fleiri. Men tað ferskasta er tó tað, sum Sjúrður Skaale hevur beinleiðis ávirkan á. Hann var ein av høvuðsmonnum aftan fyri fullveldiseksperimentið, Fregnir. Samstundis sum danskar vaskikonur guldu honum løn fyri at spinna fyri Høgna Hoydal og Tórbjørn Jacobsen á Christiansborg, so var hann oddaskribenturin á Fregnum.

Í mangar mátar var Fregnir eitt frískligt lot í føroyska blaðheiminum. Men fíggjarliga hekk tað ikki saman. Blaðið fór so logandi á heysin. Og hvør halda tit mátti gjalda fyri eksperimentini hjá Sjúrði Skaale o. fl.:? Mundu tjóðveldismenninir fara í egnar lummar?

Eg kann ímynda mær, at Tórbjørn Jacobsen hevur goldið sín ríviliga part av eksperimentinum, men eg veit, at Fregnamenninir sníktu seg undan rokningini á Prentmiðstøðini, sum Dimmalætting og Sosialurin eiga, upp á út við 200.000 kr!

Hetta hevur beinleiðis kostað Javnaðarflokkinum pengar, tí hesar pengar hevur partafelagið, sum Javnaðarflokkurin átti, mist. Pengar mistir av einum tjóðveldiseksperimenti hjá Sjúrði Skaale o. ø.

Men hetta er einki eindømi. Aðrir tjóðveldismenn hava fyrr gjørt tað sama. 14. September er ofta farin á heysin, og teir guldu heldur ikki sínar rokningar til Sosialin, sum prentaði blaðið fyri teir.

Soleiðis eru treytirnar. Tá man fer á heysin, so sleppur man undan at gjalda. Men tað merkir kortini, at tað eru onnur, sum skulu gjalda tilsvarandi meira.

At Sjúrður Skaale nú eisini skal fortelja Andras Róin og hinum á Føroya Tele, hvussu teirra økonomisku dispositiónir skulu gerast, tað man vera sum, tá eggið fór at læra hønuna...

Jóannes Eidesgaard og Javnaðarflokkurin, sum nú hava selt alt sítt blaðvirksemi, kunnu bara ergra seg um, at fólk sum Sjúrður Skaale o. o. eru orsøk til, at flokkurin hevur fingið fleiri hundratúsund krónur færri fyri Sosialin.

*eirikur@sosialurin.fo*

P. S.
Hetta skal IKKI skiljast sum eitt álop á øll tey fólk, sum ærliga og reiðiliga hava gjørt eitt megnar arbeiði fyri at fáa bløð út í Føroyum – eisini politisk bløð sum 14. September, Dagblaðið, Tingakross, Fríu Føroyar o. s. fr. Men tá menn sum Sjúrður Skaale ferð eftir ferð á so óreiðiligan hátt royna at seta okkum á Sosialinum í ringt ljós, haldi eg hesa viðmerking verða hóskandi.

# Óskilið í Tvøroyrar býráð

FINNLEIF GUTTESEN
Býráðslimur, Tvøroyri



Starvsfólkið má føla seg sum í einum djóragarði til framsýning fyri borgararnar á Tvøroyri og Føroya fólki, nú tvey starvsfólk hava sagt seg úr starvi, tí arbeiðsumstøðurnar hjá hesum báðum starvsfeløgunum gjørdist ómøguligar.

Borgarstjórin hevur ovastu starvsfólkaleiðsluna, so har liggur ábyrgdin fyri trivnaðin, men hann hevur seks aðrar býráðspolitikarar afturat sær, og mugu hesir sjálvsagt hava góðtikið starvsfólkaleiðsluna og eru tí samsekir í, at tvey starvsfólk hava følt seg trýst til at siga seg úr starvi.

At varaborgarstjórin sigur ósatt fyri øllum Føroya fólki í sjónvarpinum, har hann sigur, at hann einki kennir til umstøðurnar hjá starvsfólkinum, sigur nakað um mannin. Tí hann er formaður í teknisku nevnd, har starvsfólkini eru rikin úr starvi, og hann kennir alt til áralongu »forfylgingina« av hesum báðum starvsfólkunum.

Tað má tykjast ómansligt fyri borgaran á Tvøroyri, at allir seks býráðslimirnir bert lata standa til, menn tíverri hevur hetta verið støðan seinasta árið.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.